# Nýggi Smyril vakrasta skipið tey hava smíðað



**Nú hevur nýggi Smyril rættiliga tikið skap og nú skal hann gerast liðugur innan**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nýggi smyril er vakrastra skipið, tey hava sæð á Skipasmiðjuni í Porto Real í Spania.

Tað skoðsmálið fær nýggja flaggskipið hjá Strandferðsluni, sum í november verður sett at røkja siglingina ímillum Suðuroynna og Havnina. Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sum er fluttur til Spania í sambandi við nýggja Smyril at fylgja við bygginini, sigur, at tey, sum arbeiða á skipasmiðjuni eru rættiliga hugtikin av nýggja suðuroyarskipinum. Nú tey flestu skipini líkjast eini skóeskju við stevni, siga tey á skipasmiðjuni í Spania, at nýggi Smyril hevur so avbera vakrar linjur, at hann er vakrasta skipið, sum hevur verið í dokk har á skipasmiðjuni.

Skrokkurin er smíðaður á eini skipasmiðju hjá IZAR-samtakinum í San Fernando, beint við havnarbýin, Cádiz í Suðurspania.

Men fyri hálvum triðja mánaða síðani, varð skrokkurin sleipaður yvir á skipasmiðjuna hjá sama samtakið í Porto Real, sum liggur beint við.

Tað var ein tími at sleipa hann yvir og har er nú allur yvirbygningurin settur á hann, so at nú fæst ein verulig hóming av, hvussu nýggja suðuroyarskipið fer at síggja út. Innan eru eisini nøkur kømur eru sett upp

Hósdagin varð hann so sleipaður yviraftur á San Fernando.

À leiðini skuldi hann undir eina brúgv á vegnum til Cádiz og har mátti ferðslan steðgast og brúgvin latast upp fyri at Smyril kundi ganga ígjøgnum.

Tað gekk eitt korter at fáa hann undir brúnna, men bara tað løtuna tóku langar bíðirøðir av bilum seg upp báðu megin við.

Nú skulu allir káplar og allar aðrar innleggingar gerast, eins og hann skal gerast liðugur innan.

Síðani skulu allar tær ymsu skipanirnar umborð roynast so hvørt, tær eru lidnar og at enda skal so alt roynast í senn fyri at vita, hvussu alt riggar.

Nýggi Smyril verður handaður Strandferðsluni 30. oktober og tá verður hann sigldur heim til Føroyar.

Smyril, sum nú er, skal seljast, beinanvegin hin er settur í sigling.

### Smyril seljast

Samstundis, sum nýggi Smyril kemur, er ætlanin at selja Smyril, sum nú siglur. Á evnisdegnum, sum var um samferðslu í Suðuroy næstseinasta leygardag, var stjórin á Strandferðsluni spurdur um tað ikki var vágaverk at selja hann beinanvegin, tí hvat nú, um okkurt verður so galið við nýggja Smyrli, at hann ikki kann sigla?

Kristian Davidsen sigur, at tað er ein kansur at taka. Men tað skal ganga ómetaliga illa, verður tað so galið við nýggja Smyrli, at als hann ikki fær siglt.

Við Sosialin aftaná sigur hann, at teir fyrstu mánaðirnar eftir at nýggi Smyril er settur í sigling í Føroyum, skulu teknikarar av sponsku skipasmiðjuni vera við, fyri at kunna veita skjóta hjálp, skuldi onkrar barnasjúkur tikið seg upp.

Hann sigur eisini, at tað er nógv lættari at selja og tað fæst meiri fyri eitt skip, sum er í sigling, heldur enn eitt skip, sum liggur, tí eitt skip, sum liggur, tað ferst.

– Og so er tað dýrt at hava eitt skip liggjandi. Samanumtikið verður tískil hildið, at frægasta loysnin er at selja Smyril beinanvegin- og at tað er forsvarligt-sigur Strandferðslustjórin

Annars lata vit myndirnar tala fyri seg.







# Skilagóð avgerð hjá SvF

**Aðalstjórin á Danmark Radio, Christian S. Nissen, heldur, at føroyingar skulu gera upp við seg sjálvar, hvat teir ynskja við einum føroyskum tjóðarsjónvarpi. - Uttan at blanda meg ov nógv í føroysk viðurskifti, haldi eg, at avgerðin hjá SVF er skilagóð, heldur Christian S. Nissen um ætlanirnar hjá SVF í heyst at samsenda við DR stóran part av senditíðini**



*– Trupulleikin við smáum tjóðum vísir seg gjøgnumgangandi at vera tann fíggjarliga byrðan. Rásirnar royna at framleiða nakrar tímar um dagin, og restin av tíðini verður fylt út við týskum og amerikanskum tilfari, sigur aðalstjórin á DR, Christian S. Nissen á.*

*Mynd: Jan Müler*

SAMSENDA VIÐ DR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Danskt SVF. Ikki nøktandi. SVF provokerar. Avgerðin hjá leiðsluni í Sjónvarp Føroya um at samsenda við DR1 stóran part av senditíðini er ikki fallin í góða jørð hjá øllum. Politiski myndugleikin var skjótur upp úr stólinum at finnast at avgerðini hjá sjónvarpsstjóranum í fjølmiðlunum fríggjadagin.

Í Degi og viku hóskvøldið kom fram í ljósmála, at frá 1. oktober í ár verður føroyskt tilfar at síggja í SVF millum klokkan 18-21 hvørt kvøld, meðan restin av senditíðindi verður samsent við donsku sjónvarpsrásina DR1.

### Hvør er kosturin?

Fyrrverandi sjónvarpsstjórin, Tróndur Djurhuus, segði í viðtalu við Sosialin fríggjadagin, at hann metti ikki tað verða nøktandi frá einum Public service sjónarmiði, at ein donsk Public service rás verður samantvunnin við eina føroyska public service rás.

Christian S. Nissen er aðalstjóri á Danmark Radio, og fyri góðum mánaði síðan var hann í Føroyum á ráðstevnu um Public service, sum Nordvision skipaði fyri.

SVF hevur millum dýrastu hyggjaragjøldini í Evropa. Skulu føroyingar ikki seta hægri krøv til tjóðarsjónvarp okkara?

– Hevði SVF bara sent DR, hevði eg væl skilt ónøgdina, men teir fara hóast alt at senda 3 tímar við føroyskum tilfari. Hevur tú sett nøsina eftir, at SVF skal megna at framleiða 6-7 tímar av føroyskum tilfari um dagin, skilji eg væl, at tú gerst vónbrotin, svarar Christian S. Nissen

Aðalstjórin í DR biður føroyingar koma til eina niðurstøðu um teir ynskja áhaldandi at hava eitt tjóðarsjónvarp ella ikki.

– Kjarnan í avgerðini hjá í SVF er sjálvsagt tað fíggjarliga. Hevur tú ikki fíggjarligu karmarnar til at gera fleiri tímar av føroyskum tilfari, ert tú noyddur at fyrihalda teg til tað. Føroyingar mugu fyrst og fremst hugsa um alternativið til avgerðina hjá SVF, og um tit framhaldandi vilja hava eitt tjóðarsjónvarp ella ikki. Tú kanst halda á við at smyrja tunt í senditíðini, men leiðslan í SVF hevur valt at raðfesta øðrvísi. Uttan at blanda meg ov nógv í føroysk viðurskifti, haldi eg, at avgerðin hjá SVF er skilagóð, heldur Christian S. Nissen

Hann greiðir frá, at fíggjarætlanin hjá SVF svarar bert til 1% av árligu fíggjarætlanini hjá Danmark Radio. Játtanin til DR svarar til góða 3 mia. krónur, meðan fíggjarætlanin hjá SVF er um 30 mió. krónur.

### Onnur dømi

Spurdur, um hann kennir til aðrar sjónvarpsrásir í Evropa, sum hava roynt sama leist, ið Sjónvarp Føroya hevur í hyggju eftir 1. oktober, svarar aðalstjórin á DR, at hann kennir fleiri dømi.

Hann nevnir tjóðarsjónvørpini í londum sum Bosnia, Lettlandi, Estlandi, Litava og øðrum tjóðum á Balkan, ið hava roynt sama leist, tí sjónvarpsrásirnar settu seg ikki fyri at fylla alla senditíðina við tilfari, ið sjónvarpsrásin sjálv framleiddi.

– Trupulleikin við smáum tjóðum vísir seg gjøgnumgangandi at vera tann fíggjarliga byrðan. Rásirnar royna at framleiða nakrar tímar um dagin, og restin av tíðini verður fylt út við týskum og amerikanskum tilfari, vísir Christian S. Nissen á.

### Norðurlandaráðið

– Vit hava eina ómetaliga stóra gleði av at hava føroyingar við í norðurlendska fjølmiðlasamstarvinum. Onnur lond øvunda okkara samstarvi, og eg ivist ikki í, at avgerðin hjá SVF verður við til at sameina Føroyar enn meir í norðurlendska fjølmiðlasamstarvið.

Christian S. Nissen greiðir frá, at politikarar í Norðurlandaráðnum hava seinnu mongu árini lagt nógv fyri at økja um fjølmiðlasamstarvið í Norðurlondum. Umboðini hjá dønum í Norðurlandaráðnum hava leingi tvíhildið um at fáa fleiri sendingar frá norskum og svenskum sjónvarpið.

– Avgerðin hjá SVF er avgjørt í tráð við menningina av Norðurlendska samstarvinum. Tú skalt eisini minnast, at vit á DR senda eisini nakrar tímar við norðurlendskum tilfari um vikuna, sigur aðalstjórin á DR

### Annita fer skeiv

Í Sosialinum fríggjadagin helt tjóðveldistingkvinnan, Annita á Fríðriksmørk, at SVF átti at sløkt eftir klokkan 21, um stovnurin ikki hevði orku til at viðgera útlendska tilfarið. Christian S. Nissen mælir harðliga ímóti, at SVF bert fer at senda nakrar fáar tímar um dagin, og síðani sløkkja, tá føroyska tilfarið er av.

– Tað er fyri langari tíð prógvað, at tað er ikki nóg mikið hjá eini sjónvarpsrás at senda 2-3 tímar um dagin. Hyggjarin missir áhugan fyri rásini alt fyri eitt, og velir at leita eftir øðrum rásum. Skalt tú gera sjónvarp krevst, at rásin alla tíð hevur eina ávísa nøgd av tilfari, sigur Christian Nissen at enda.

*– Tað er burturvið, at vit skulu rinda 2000 krónur í sjónvarpsgjaldið fyri at hyggja at óviðgjørdum útlendskum tilfarið. Er ikki orka til at umseta tilfarið ella fáa føroyskar røddir, átti Sjónvarpið at havt svartan skerm eftir klokkan 21.*

**Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna Tjóðveldisfloksins**

*– Teir taka okkum til gíslar við hasum framferðarháttinum. At markið er sett til 1. oktober er sjálvsagt ikki tilvildarligt, tí júst tá verður farið undir at viðgera fíggjarlógina fyri 2005.*

**Andrias Petersen, formaðurin í mentanarnevndini**

*– Út frá einum public service sjónarmiði er tað sjálvandi ikki nøktandi. Eg ivist í, um tað er rætt at blanda eina danska public service rás og eina føroyska rás upp á handa mátan.*

**Tróndur Djurhuus, fyrrverandi sjónvarpsstjóri**

*– Dreymurin um eitt føroyskt sjónvarp gerst ikki veruleiki við tí fíggjarorku, hyggjaragjøld og gekkaspøl geva - og so langt ífrá. Skulu vit hava eitt veruligt føroyskt tjóðarsjónvarp, so skulu politikararnir tríva djúpt, ja, ógvuliga djúpt í sínar lummar, tí veruligt føroyskt sjónvarp kostar fleirfalt ta fíggjarorku, sum SvF ræður yvir.*

**Johan Petersen, lesarabræv**

*Politiski myndugleikin hevur ongantíð gjørt sær greitt, hvat hann vil við føroyskum sjónvarpi. Orsøkin til, at vit í dag hava føroyskt sjónvarp, er, at tað í SvF starvast nakrar eldsálir, sum royna at skapa eina meining við sínum starvsliga gerandisdegi. "Arbeiðsgevarin", sum í seinasta enda er løgtingið, hevur ikki dugu/kunna/vilja tikið støðu til, hvussu føroyska sjónvarpsuppgávan skal loysast.*

**Jóannes N. Dalsgarð, lesarabræv**